# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: | Lóg: | Avgerð tikin: |
|---|---|---|
| 11/00143 | Lóg um Toll- og Skattafyrisiting § 22 | 27.09.2011 |

## Mótrokning av útlendskum barnapeningi í avlopsskatti. Avvíst.

**Samandráttur:**

**Kært er um, at TAKS hevur mótroknað útlendskan barnapening í avlopsskatti. Nevndin hevur ikki málsføri at taka støðu til avgerðir um mótrokning av barnapeningi, tí mótrokningin er gjørd av TAKS sum liður í teirra innheintingarvirksemi. Kæran um mótrokningina er tí ein kæra um innheinting av barnagjaldi og ikki ein kæra um toll, skatt ella mvg. Grundað á hetta hevur nevndin avgjørt at avvísa kæruna.**

### Avgerð

**Kært er um**, at TAKS hevur mótroknað útlendskan barnapening í avlopsskatti.

**Kærarin** upplýsir m.a., at hann hevur avtalu um at gjalda 1.200 kr. til útlendskan barnapening til TAKS.

TAKS hevur lovað kæraranum, at teir ikki skulu taka pening frá honum, um hann fær pening aftur í skatti, men tað hendir opinbart automatiskt. Upphæddin, sum málið handlar um, er kr. 10.620.

**Avgerðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini**
Sambært § 22 í løgtingslóg nr. 169 frá 30. desember 1997 um toll- og skattafyrisiting viðger Skatta- og avgjaldskærunevndin toll-, skatta- og avgjaldskærur.

Vísandi til hesa grein hevur nevndin ikki málsføri at taka støðu til spurningar viðvíkjandi barnagjaldi, herundir um skyldu at gjalda barnagjald o.s.fr.

Nevndin hevur heldur ikki málsføri at taka støðu til avgerðir um mótrokning av barnapeningi, tí mótrokningin er gjørd av TAKS sum liður í teirra innheintingarvirksemi. Kæran um mótrokningina er tí ein kæra um innheinting av barnagjaldi og ikki ein kæra um toll, skatt ella mvg.

**Grundað á omanfyri standandi verður avgjørt at avvísa kæruna.**

Viðmerkjast skal, at Skatta- og avgjaldskærunevndin áður hevur tikið støðu til, um TAKS kann mótrokna barnagjald í avlopsskatti. Nevndin hevur tó síðani avvíst kærur um t.d. móttokning av sjúkrakassagjaldi í avlopsskatti við tí grundgeving, at talan er um eina avgerð, sum er liður í innheintingarvirkseminum hjá TAKS, og er tí ikki ein kæra um toll, skatt ella avgjøld sambært § 22 í toll- og skattafyrisitingarlógini.